Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Inntøkumetingar og útreiðslur í landsroknskapinum 2020 og 2021 og í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2022

Spurningar:

1. Hvussu metir Fíggjarmálaráðið inntøkurnar av veiðigjøldum/tilfeingisgjøldum í fiskivinnuni fyri 2021 – og hvat byggja metingarnar á fyri veiðu av ymsu fiskasløgunum og ymsu gjøldunum, ið verða løgd til grund?

2. Tá ið kvotur ikki verða fiskaðar, men fluttar til komandi ár, hvussu verður roknskaparliga og fíggjartekniskt gjørt upp á fíggjarlóg og í landsroknskapinum – t.e. verða inntøkurnar av veiðigjøldum altíð inntøkuførdar til tað árið, kvoturnar veruliga eru fiskaðar?

3. Hvussu hevði væntaða RLÚ-úrslitið verið í 2021 og í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2022 í krónum og oyrum, um inntøkurnar av vinningsbýti frá BankNordik høvdu verið sum í fíggjarárinum 2020?

4. Hvussu nógv eru rakstrarútreiðslurnar á fíggjarlógini vaksnar hvørt árið og tilsamans í 2020, 2021 og í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2022 – í krónum og oyrum og í prosentum?

Viðmerkingar:
Tíverri bendir nógv á, at føroyska makrelkvotan til føroysk skip neyvan verður fiskað í ár. Vónandi hilnast betur við norðhavssildini og svartkjaftinum.

Tí verður spurt, hvussu hetta ávirkar metingarnar av úrslitinum hjá landskassanum í 2021. Eisini verður spurt, hvussu úrslitið hjá landskassanum hevði verið mett í 2021 og í fíggjarlógaruppskotnum fyri 2022, um inntøkurnar av vinningsbýti frá BankNordik høvdu verið sum í 2020.

At enda verður spurt, hvussu nógv rakstrarútreiðslurnar á fíggjarlógini eru vaksnar í 2020, 2021 og í uppskotinum fyri 2022 – fyri hvørt ár sær og tilsamans, bæði í krónum og í prosentum.

Á Løgtingi, 15. november 2021

Høgni Hoydal